Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 14. oktober 2005



**Smáu einglabørnini 1:4**
Bretski barnasálarfrøðingurin Tanya Byron heldur, at um børn skikka sær illa, eru tað oftast foreldrini, sum treingja til uppaling. Jo og Jason Barton eiga tríggjar dreingir, sum eru fimm, trý og tvey ára gamlir. Teir líkjast einglum, men skikka sær ikki sum einglar. Teir berjast og akta als ikki. Túrar í býnum eru marrur og í songartíðini leikar kríggj á.

**Mánadag 17. kl. 21.50**



**DR Dokumentar: Bumban í lastini**
Fyri fimm árum síðan var ein ógvuslig spreinging umborð á farmaskipinum Thor Emilie - øll manningin, undantikið kapteyninum Torben Mats, druknaði. Sendingin avdúkar, at eingin av manningin kendi til vandamikla farmin, ið skipið førdi. Fylgt verður við Mats, tá ið hann fer til risafelagið Glencore, ið gav skeivar upplýsingar viðvíkjandi farminum.

**Mikudag 19. kl. 19.00**

**Til vit hittast aftur 3:3**
Annar Heimsbardagi herjar og familjan Lancel er spjadd. Men ein av krígsfangunum, sum skulu hjálpa til at heysta vínber, kennir Eve aftur sum Armand, og hon setur lívið í váða til tess at bjarga honum undan týningarleguni. Tá kríggið er endað, savnast familjan á garðinum, sum er um at fara á húsagang.

**Sunnudag 16. kl. 20.50**

TV Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**